## Keypa nú norskan fisk

Í Grimsby hava tey kent sviðan av, at íslendska stjórnin legði avgjald á feskan fisk, sum bleiv sendur á bretska marknaðin. Avgjaldið, sum er fimm prosent, kom í gildi í vetur, og síðani er munandi minni fiskur úr Íslandi komin upp á land í Grimsby, skrivar blaðið Grimsby Telegraph. Blaðið skrivar, at umleið 70 prosent av fiskinum, sum kom upp á land í Grimsby, kom úr Íslandi, men at nú eru fiskakeypararnir nú farnir at keypa norskan fisk ístaðin fyri. Grimsby er nógv tann størsti fiskivinnubýurin í Bretlandi.



## NASA kannar ís

Vanliga kenna við NASA sum tann amerikanska stovnin, sum ger kanningar í rúmdini, men stovnurin kannar eisini viðurskifti niðri á jørðini. Í gjár kom eitt flogfar til Grønlands við nøkrum NASA-granskarum, sum skulu kanna ísin við Norðpólin. Tær næstu fimm vikurnar skulu granskararnir flúgva nakrar ferðir uppi yvir pólísinum við serligum tólum, sum vísa, hvussu nógvur ísur er har, og hvussu tjúkkur hann er. NASA sigur, at vanliga er ísurin mestur í mars og apríl, og tí verða kanningarnar gjørdar nú.

# fiskað makrel



*Størsti trupulleikin við veiði eftir makreli um summarið er, at fiskurin er fullur av æti. Um magin spreingist, gerst fiskurin virðisleysur. Men loysn er ivaleyst fyri hesum*

røkka fleiri marknaðum, sum geva tann besta prísin. Um fitiinnihaldið er lægri, kann makrelurin bert seljast til "canned marked", sum tað verður rópt. Um prísur skal fáast fyri makrelin, er neyðugt, at túrarnir ikki eru longri enn 24 tímar, og at fiskurin verður goymdur í ísvatni.

Dánjal Jákup Andreassen metir eins og Sonfinn Ellefsen og Leivur á Rógvu, at neyðugt er at kryvja makrelin, áðrenn hann verður frystur - í øllum førum fyrra partin av sesongini.

### Niðurstøða

Kristian Zachariassen er eftir samrøðurnar, hann hevur havt við menn, sum veiddu makrel og við virkisleiðaran, Dánjal Jákup Andreassen, komin eftir, at nógvur makrelur hevur verið í føroyskum sjógvi í fjør summar.

- Um prísur kundi fingist, høvdu nógvir lagt seg eftir at fiskað makrel, er hann sannførdur um.

Lagt verður aftrat, at størsti trupulleikin er, at magin spreingist, og tí verður fiskurin virðisleysur.

- Hetta kann loysast við at skipa soleiðis fyri, at fiskurin verður kruvdur, tá hann kemur til lands. Besti prísur fæst tó fyri hann eftir ólavsøku.

Kristian Zachariassen heldur, at eitt hugskot kundi verið at gjørt eina verkætlan við makrelinum.

- Her kundi verið at kannað, hvussu nógv er til av makreli inni við land, og eisini kundi verið hjálpt til við at fingið góðskuna upp. Her er loysnin at kryvja makrelin, tá hann verður landaður, sigur Kristian Zachariassen á Havstovuni.







*Soleiðis eru bátarnir í Noregi riggaðir til dyrging eftir makreli. Føroysku bátarnir eru riggaðir á líknandi hátt, men allir hava ikki líka nógvar dergir sum teir norsku*